TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# Felagsinnskriving í
## Tórshavnar kommunalu skúlar skúlaárið 2002/2003

Foreldur ella verjar, ið ætla at lata barn/børn født fyri 1. januar 1996 í **1. flokk í Argja skúla, Venjingarskúlanum, Tórshavnar Kommunuskúla, Sankta Frans skúla, Eysturskúlanum ella Hoyvíkar skúla** næsta skúlaár, verða biðin at siga frá í býráðssalinum 29. ella 30. januar 2002.

**Innskrivingin**
Innskrivingin í allar skúlarnar er í býráðssalinum **týsdagin 29. og mikudagin 30. januar, báðar dagarnar frá kl. 3-6 seinnapartin. Havið dóps/navnabræv við.**
Mentamáladeildin skipar fyri einari felagsinnskriving. Pláss er ikki fyri øllum teimum næmingunum, sum búgva næst við ávísan skúla í býnum, tí er neyðugt at flyta næmingar í skúla, har pláss er.

**Eisini ber til at ringja**
Møguleiki er eisini at ringja í býráðssalin somu tíð tlf. 254010

**Skúlaumbøn**
Tað ber til at biðja um at fáa barn/børn í ein av skúlunum. Mentamáladeildin fer saman við skúlastjóranum at kanna eftir, um tað er gjørligt, sum plássviðurskiftini í skúlanum eru. Tá ið felagsinnskrivingin er liðug, fær hvør skúli boð um, hvørjir næmingar skulu koma í 1. flokk.

**Hoyvíkar skúli**
Næmingar í Hoyvíkar skúla fara í skúla kl. 11.50, men kunnu fara í Frítíðarskúla fyrrapart, Tó fer ein flokkur í skúla fyrrapart. Tað verða tey, sum búgva inni á Gøtu.

**Argja skúli**
Næmingarnir á Argjum fara í skúla kl. 11.40, men kunnu fara í Frítíðarskúlan fyrrapart.

**Kollafjarðar skúli**
Innskrivingin í Kollafjarðar skúla er í skúlanum **týsdagin 29. januar, frá kl. 3-5 seinnapartin.** Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í skúlanum somu tíð, sum innskrivingin er.

**Kaldbaks skúli**
Innskrivingin í Kaldbaks skúla er í skúlanum ella á tlf. 317845.

**Frítíðarskúlin**
Børn, ið skulu í Frítíðarskúlan, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er. Eisini fáast umsóknarbløð til Frítíðarskúlan í Snarskivuni, heimasíðu kommununnar (www.torshavn.fo) ella á tlf. 315160.

**Meiri fæst at vita**
Meiri fæst at vita um innskrivingina í skúlunum ella í mentamáladeildini, Jákupi Simonsen, deildarleiðara í trivnaðarfyrisitingini, tlf. 315160.

**Tórshavnar kommunalu skúlar**

# Pedagogur

Søkt verður eftir pedagogi til at arbeiða við døgnumlætting av børnum við autismu at byrja 1. mars ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðstíðin er í miðal 30 tímar um vikuna.

Eitt sera spennandi starv, við nógvum møguleikum til at mennast fakliga. Eitt nú við, skeiðvirksemið, supervisión av praktiska arbeiðinum og faklig vegleiðing.

Arbeiði er dag-, kvøld-, nátt-, og vikuskiftisvaktir.

Av tí at hetta er ein nýggj verkætlan krevst, at umsøkjarin dugir at taka ábyrgd og kann tilrættaleggja arbeiði sjálvstøðugt. Stórur dentur verður lagdur á at samstarva við foreldur, fakligar vegleiðarar og leiðslu.

Løn og setunarviðurskifti sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja á tlf. 457185 ella 217185 og tosa við Hildu Viderø.

Umsókn við avritum av prógvi og møguligum viðmælum, skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 14. februar 2002.

**Umlættingarheimið Dáin**
Mýruvegur 11
700 Klaksvík

Í samband við uppudding á goymsluni
selja vit hesi H-vindeygu fyri serprísir:

2 stk. 120x160
2 stk. 140x150
1 stk. 60x70 (føst ramma)
1 stk. 110x150
1 stk. 110x120
1 stk. 100x120
1 stk. 120x160 (v/tvørsprossum)
1 stk. 150x210 (rútaparti við loddrøttum sprossum og ráglasi)



Vestmanna Timburhandil
Telefon 472000


BÓKHALDSSTOVAN
hjá Regin Klargaard
FO-176 Velbastaður

RK

MvG uppgerð - roknskap v.m.

tlf 32 81 96
fax 32 81 98


# Skrivstovulærlingur

Søkt verður eftir skrivstovulærlingi við HH ella líknandi prógvi at byrja beinavegin.

Skrivlig umsókn.

**P/f Meinhardt Arge**
Box 3171
110 Tórshavn


**Vit hava nú aftur fingið nakrar flugufangarar á goymslu**



**Flugufangarnir eru sera effektivur og verða brúktir bæði privat og á virkjum, fjósum o.a.**

| | | |
|---|---|---|
| ALTI 2100 til rúm støddir uml. 50-80 m² | prísur einans | kr. 1.895,- |
| ALTI 2138 til miðal stór rúm uml. 100-150 m² | prísur einans | kr. 2.095,- |
| ALTI 2214 til rúm støddir uml. 200 m² | prísur einans | kr. 2.995,- |

**SPF. ALTING** tlf. 210 298 fax 318 591

Vit senda um alt landið




# Starvsfólk til Útibarnagarð

Til Útibarnagarðin í Runavíkar kommunu, verður søkt eftir 1 pedagogi og 2 hjálparfólkum at byrja 1. mars 2002 ella eftir nærri avtalu.

Útibarnagarðurin fer at halda til í skúlanum í Lamba, sum verður útbygdur til endamálið, men til útbyggingin í Lamba er liðug, verður hildið til í Missiónshúsinum í Æðuvík.

Á stovninum verða 25 børn í aldrinum 5-7 ár.

**Vit ynskja**
- at tú dámar væl at vera úti í náttúruni
- ert kreativ/ur
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- ert við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- hevur góð samstarvsevnir

Løn smb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Skrivlig umsókn, saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 08.02.2002.

Runavíkar Kommuna

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur
600 Saltangará

# Pedagogar
## til frítíðaransingina í Fuglafjarðar kommunu

Fuglafjarðar kommuna loyvir sær hervið at søkja eftir 2 pedagogum til frítíðaransingina í Fuglafjarðar kommunu.

Størvini, sum eru normerað til 35 tíma viku, verða sett frá 15. februar 2002 at rokna.

Um eingin pedagogur søkir størvini verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Bartal Eliasen, leiðara á tlf. 227385.

Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum skal verða Fuglafjarðar kommunu, Postsmoga 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi fríggjadagin **8. februar 2002 kl. 15.00.**

Kommunan skilar sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 23. januar 2002
**Fuglafjarðar kommuna**

# Handilsmiðdepilin í Runavíkar Kommunu

## Handilsmiðdepilin í Runavík søkir samskipara

Søkt verður eftir fólki til Handilsmiðdepilin í Runavík. Starvið er eitt hálvdags starv og verður sett skjótast gjørligt.

**Starvið**
Tann, sum settur verður, kemur í høvuðsheitum at marknaðarføra Handilsmiðdepilin, sum er eitt samtak av 33 handlum í kommununi. Arbeiðið er sera sjálvstøðugt, men persónurin kemur tó at hava tætt samstarv við Kunningarstovuni í Saltangará. Arbeiðið fevnir um ymiskar uppgávur so sum:

- Marknaðarføring av Handilsmiðdeplinum
- Leggja ætlanir fyri árið, mánaðir osfr.
- Víðka um Handilsmiðdepilin, fáa fleiri handlar við
- Fyriskipan av tiltøkum og skeiðum
- Samstarv við handlarnar

**Førleikakrøv**
Útbúgving ella royndir innan marknaðarføring og grafiskt arbeiði er ein fyrimunur. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur:

- áræði
- góð samstarvsevni
- gott hugflog
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt & fleksibult
- EDV kunnleika á brúkarastøði

Løn sambært avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Eysturoyar Kunningarstovu, tlf. 449449

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og viðmælum skal sendast til Handilsmiðdepilin innan 20. februar.

**Handilsmiðdepilin**
Boks 200
600 Saltangará
tlf. 449449

# Bilur við skaða til sølu

**Merki:** Peugeot 306 2.0 HDI, grá-bláur, 5 hurðar
**Árg.:** 2000
**KM.:** 21.000
**Eyka útstýr:** El-rútar framman, el-spegl, sentrallás.

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.
Stendur hjá Tryggingarfelag Føroya í Runavík.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Bjartur Brekkstein, sýnsmaður
t-postur: bjb@trygging.fo
Tlf. 448190 ella 345771
at hitta millum 08³⁰–14⁰⁰


**Stórt úrval**




**-lágir prísir**
**og góð tilboð**

**Storno**
Handan á 6 · 100 Tórshavn
tel 31 44 14 · fax 31 80 45

Sosialurin 311820


# Sethús til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru hesi sethúsini á Kambsdali til sølu.



Støddir: 170 $m^2$ umframt bilhús uppá 34 $m^2$.

Húsini eru bygd í 1989 og eru í sera góðum standi.

**Tlf. 444796 ella 214796**


Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir
Tiltøk